

MYND: POLFOTO

*Heimsins elsta sjampanja og ølfløskur eru funnar í álendskum sjógvi. Fløskurnar skulu nú seljast á uppboðssølu*

# Heimsins elsta sjampanja á Álandi

Í **FJØRSUMMAR** VÓRU GAMLAR **SJAMPANJUFLØSKUR FUNNAR** Í EINUM VRAKI Í **ÁLENDSKA** SKERGARÐINUM. NÚ SKULU **DÝRU** DROPARNIR **SELJAST** Á **UPPBOÐSSØLU**



SJAMPANJA
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Tað vóru nakrir dýrir dropar, sum bókstaviliga komu undan kavi á Álandi í fjørsummar.

Kavarar funnu gamlar sjampanjufløskur í einum skipsvraki í skergarðinum sunnan fyri Áland, og eftir at fløskurnar vóru bjargaðar og kannaðar, vísti tað seg, at talan helst er um heimsins elstu sjampanjufløskur.

Roknað verður við, at sjampanjan er frá umleið 1825 og hevur í hálvaaðru øld ella meira ligið á havsins botni. Kanningar hava víst, at sjampanjan kann framvegis drekkast, og tað hevur veruliga gjørt fløskurnar forvitnisligar.

Talan er um hálvtannað hundrað sjampanjufløskur umframt onkrar ølfløskur. Allar fløskurnar eru í góðum standi, og nú er ætlanin at selja tær á uppboðssølu.

## Dýrir dropar

Fleiri metingar eru gjørdar av, hvat sjampanjufløskurnar kunnu seljast fyri. Onkur meting sigur, at fløskurnar kunnu seljasta fyri upp ímóti hálvari millión stykkið, men veruligi prísurin verður ikki ásettur, fyrr enn fløskurnar eru seldar á uppboðssølu.

Tað eru funnin trý ymisk sløg av sjampanju – Juglar, Veuve Clicquot og Heidsieck.

Ætlanin er, at innihaldið í onkrum av fløskunum skal brúkast til at framleiða eitt nýtt, eksklusivt slag av sjampanju.

Álendingar rokna eisini við at fáa nógv burtur úr sjampanjufløskunum. Eitt er, at stjórin hevur fløskurnar í varðveitslu og skal selja tær, og annað er, at fløskurnar kunnu brúkast til altjóða marknaðarføring av Álandi í komandi tíðum.

## INNIHALD

2 KLUMMA: **TOLIÐ ER UPPI**
4 INTERVIEW: **SUNI SKYLV REINERT**
8 BAKGRUND: **VETRARTUNGLYNDI**
10 TIPS: **BLOGGAR**
12 90 SEKUND: **JÓGVAN ARGE**
14 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
16 INTERVIEW: **ANNA DJURHUUS**
18 TAÐ ER **TÍÐIN**
20 SØGULIG HENDING: **ABRAHAM LINCOLN**
24 TÝSKARAR **OG FØROYINGAR**
30 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
31 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
32 VIKUMYNDIN: **MÓTI Í NEW YORK**

**KLUMMAN**



*Randi Jacobsen*

# Tolið er uppi

Eg og hundur mín hava í hvussu er eitt til felags: Vit og lágtrýstini eru ikki so væl.

Av tí sama ganga vit bæði mangan og hanga við høvdinum og bíða eftir, at barometrið skal fara upp.

Fleiri og fleiri fólk gremja seg um vetrardepressión. Tað er eingin skomm longur, og fólk smæðast ikki við at siga, hvussu ilt myrkrið ger teimum.

Annars plagi eg at liva eftir setninginum, at er veðrið ringt, kann tað bara gerast betri, og eingin orsøk er at stúra í illveðri, tí tað skiftir so knappliga.

Men ein vetur sum hesin er hvørki fyri fólk ella fæ.

Í vikur hevur verið næstan ógjørligt at heilsa upp á fólk á vegnum. Øll hava verið pakkað so væl inn í klæðir, at tey hava verið ókennilig.

Men, men. Ikki er neyðugt at falla í fátt.

Tað lætti væl um, tá ið dagarnir fóru at leingjast. Nú er ikki myrkt longur, tá ið vit fara heimanifrá, og vit hava eina ljósa løtu eftir arbeiðstíð.

Fyrsta tjaldrið í ár havi eg hoyrt látað.

Krokusarnir koma nú eisini sendandi upp úr moldini.

Várið er í nánd, og fleiri við mær munnu gleða seg til at sleppa út í moldina.



VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Hovuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Anna Djurhuus / Jens Kristian Vang